VIÐMERKINGAR

Koyrandi millum Øravík og Hov í 2006

Hergeir Nielsen

Hesa tíðina í fjør sóu vit Johan Dahl fegnast um eitt lyftið frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni, í Dimmalætting.

"Bjarni Djurholm lovaði frá Tingsins røðarapalli í næstseinastu viku, at útgerðin skuldi flytast frá Gásadals tunnlinum og til Suðuroyar, tá liðugt var at bora fjgjøgnum til Gásadals.

" — segði tann himmalfegni Johan Dahl. 2. oktober 2002

Vit vóru fleiri, ið ætaðust yvir ætlaninar hjá hesum báðum og fingu tíbetur støðga teimum.

Tað vóru óráð, at plaffa eina fjallasmogu út undan Hovstúgvuni við elligomlum materiellið úr Gásadalsbergholinum, hildu vit, og hetta var als ikki nakað at bjóða suðringum í hesi øldini.

2. februar 2003 í ár fekk landsstýrismaðurin tí eitt uppskot frá okkum, har NCC í einum hjálagdum skjali segði seg kunna gera ein tunnil, har hann skuldi vera sambært vanligum viti og skili.

Harafturat var tað hildið skilaleyst at liggja og fesjast uppi í fjøllunum við eini óneyðugari vegagerð fyri 50 mió.kr.

Sjálvandi gjørdust menn pripnir, og serliga tann politiski myndugleikin.

Ein heilt náttúrlig reaktión var so at forhála málið og látast at kanna tað enn meira. Hetta var fullkomuliga óneyðugt, men kortini nakað sum vit noyddust at liva við.

Kanningarnar eru nú lidnar, og tað mest fullkomna tunnilsfarið, ið hugsast kann, er nú til taks á Jarðfrøðissavninum.

Verklagslógin fyri Øravík Hov, sum skuldi á tingborð á Ólavsøku, bíðar nú ikki eftir øðrum enn vanligum óneyðugum dráli frá almennari síðu.

Aftur til Johan Dahl. Vit hava sjálvandi lagt merkið til politisku spekulatiónir hansara í orð og tal, og so sjálvandi eisini, at púrt einki er framt í verki frá hansara hond.

Síðan løgtigsfiggjarlógaruppskotið fyri 2004 kom út, hevur hann saman við flokki sínum kólað óført uppi yvir almennu útreiðslunum.

Almennu útreiðslurnar á figgjarlógini eru alt ov høgar, sigur hann í Dimmalætting um vikuskifti, og skjýtur so upp, at Hergeir Nielsen sum einasti tingmaður fyri Suðuroynna kann: "fáa sett eina upphædd á figgjarlógina fyri 2004, sum munar nakað og arbeiðið veruliga við kraft fer ígongd næsta ár."

Johan Dahl, sum einki uppskot hevur um sparingar, øtast yvir almenna útreiðslustøðið, og heitir nú á meg um at økja tað enn meira.

Hjálparleyst roynir hann at seta seg sjálvan í fokus í sambandi við verkætlanirnar í Suðuroynni, meðan eg sum einasti suðuroyartingmaður skal hava skyldina, um tær ikki koma.

Sjálvandi hevur hann sítt fulla mandat til at koma við øllum teimum hugskotum honum lystir, eitt nú framtíðarvisjónum sínum um eitt Gásadalsberghol í Suðuroynni gjørt yvir eitt longri áramál.

Men sjálvur haldi eg, at tað hevur størri týdning at fáa rætta tunnilin fyri røttu pengarnar røttu løtuna.

Vildi fegin, at byrja var tann dag í morgin, men sum viðurskiftini síggja út nú, so verður tunnilin boðin út í komandi ári, og gjørdur liðugur eftir tveimum árum.

Hetta merkir, at koyrandi verður millum Øravík og Hov í 2006.

HEILSANIR

Hjartaliga takka vit øllum tykku, ið vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 17. mai 2003 minnisríkan og ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur og fjarrit. Eisini vilja vit takka øllum tykkum, sum hjálptu og vóru við til at fyrireika dagin.
Heilsan Finngerð og Ingolf

Góða Barbara
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum í gjár
Heilsan mamma og babba

Góða elskaða dóttir
Lukku og gleði á tínum 2 ára degi.
Bestu heilsanir mamma og pabba

Góða Barbara
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum í gjár. Takk fyri, at tú ert so góð við meg.
Pip, pip
Finn

Góða fitta systir
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum.
Bestu heilsanir frá Ba

Góða Olivia
Hjartaliga tillukku við degnum 5 okt. Hav ein góðan dag mánadagin.
Mamma og pabba

Hurrá hurrá!!!
Hendan steikin úr Klaksvík fyllir 30 ár. Til lukku við tí. (Vell mynd, ha?)
Heilsan familjan hjá Focus

Góða Elinborg
Hjartaliga til lukku við 30 ára føðingardegnum.
Ynskja vit øll Bjarki og Rúni

Heilsanir 30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Hebron, Argir
Mikukvøldið kl. 21 verður bíbliutími og bønarløta.
www.hebron.fo

Ebenezer
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Lívdin
í Hoyvíkar skúla
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bíbiltími, undirvíst veðrur um Opinberingina (kap. 6-7).
Heimasíðan www.livdin.fo

Meinigheitshúsið
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími, Áps. 24,22-25,12.
Mikudagin kl. 19 venur Meinigheitskórið í Kollafirði.
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta – kvinnur, kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Høgna Poulsen, Meinigheitskórið syngur.

KFUM og KFUK í Havn
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Filadelfia
Landavegur 22
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Týsdagin kl. 17 Juniorhornvenjing, kl. 20 Seniorhornvenjing.
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 17.30 Títlingasangur, kl. 19 Barnarøddir.
Hósdagin kl. 19 skipar Heimaforbundið fyri stórari Árasølu har øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Mikukvøldið kl. 20
Bønarmøti hjá Annfinn og Gerd Norðfoss, Gráastein 8.

Saron, Vestmanna
Í kvøld kl. 20 Opið hús fyri ung.
Hósdagin kl. 19 Fritíðararbeiði.
Telefonandaktin 424741.

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Karl Jóhan Nielsen talar. Evni: Lóg og náði (Galatiabrævið).

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20, Thomina Svøðstein vitnar. Filmur verður vístur, allar kvinnur eru vælkomnar.

Betania, Skopun
Mikudagin kl. 20 Bønarmøti. Vælkomin í Betania.

Missiónshúsið í Skopun
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.

Frá samkomum í Suðuroynni
Evangelisk møtirøð verður í TB-húsinum frá 31. okt. til 2. november. Hvørt kvøld kl. 20.

Café One Way, Tvøroyri
Dynamis bíbliuskúlin verður leygardagin 1. nov. kl. 10-12 og kl. 13-15. Tilmelding á tlf. 222694.
Alpha-skeið verður mánakvøldið 3. nov. kl. 18.30. Øll eru vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Í kvøld kl. 20 Heimaforbundið.
Ónsdagin kl. 19 Juniorsoldátmøti.

Betel, Vágur
Týskvøldið kl. 20 Kvinnufundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 27. oktober
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Vit virka til jóla í kjallaranum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
kl. 14.30 Vit práta og síggja myndir frá Hetlandi í teldurúminum
Týsdagin 28. oktober
kl. 10-12.00 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja – Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Málprát, Jóhan H. W. Poulsen
Mikudagin 29. oktober
kl. 10-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði.
kl. 15.00 Túrur
Hósdagin 30. oktober
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát
Fríggjadagin 31. oktober
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Hourlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir. Tilm. mánadag, tlf. 316491
kl. 13-17 Vit virka til jóla

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Pensionistafelagið í Havn
Vit koma saman hvørt mikukvøld kl. 19 til ymisk spøl og hugna. Einaferð um mánaðin hava vit bingo og tá byrja vit kl. 18. Øll m/k sum eru 60 ár kunnu gerast limir, annars er aldurin fyri fyritíðarpensionistar og avlamispensionistar 55 ár.

Eldrafelagið Borgin
Hugnaløta verður í Felagslonini týskvøldið 28. okt. kl. 19.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
Mánadagin 27. okt.
Jákup Reinert Hansen tosar um at blíva eldri í dagsins samfelag.
Mikudagin 29. okt.
Sólrun Christiansen lesur brot úr »Sin egen lykkes smed«.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

NA (Anomymir narkomanar)
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstoðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Sveriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Felagið fyri lesi- og skriviveik
Postadr.: MBF-Húsið
Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

V4-dráttur
í drátti nr. 1510
25. okt. 2003

Tølini: 0 - 12 - 20 - 30 - 49 - 50 - 51 - 59 - 61 - 70 - 75 - 76 - 77 - 92 - 96 - 98

Otta vinnarar
Snars. nr. 2497711, Saltangará
Snars. nr. 2577381, Tórshavn
Snars. nr. 2579883, Klaksvík
Snars. nr. 2582529, Vestmanna
Snars. nr. 2588720, Tvøroyri
Snars. nr. 2617009, farseðil
Snars. nr. 2617881, farseðil
Snars. nr. 2721620, Vestmanna

Eykavinningur
Frá drátti 1505 hevur snars. nr. 2596032 (Hornið í SMS) vunnið eykavinningin uppá 150.000 kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

BRÚDLEYP

Leygardagin 6. desember kl. 14.00 giftast í Býráðssalinum í Klaksvík, Martha Justesen, Norðdepli og Andrias Hammer, Eiði. Veitslan verður hildin í Skúlanum á Fossánesi kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 318709, 423081 ella 452074 áðrenn 23. nov.